

## Súni Fríði um Ábraham Løkin

- Ábraham Løkin var mín fyrimynd sum fótbóltsspælari. Eg minnist, hvussu nógv eg sá upp til hann, tá ið eg var yngri. Hann var ein sera fjøllbroyttur spælari. Hann er ein av teimum fáu føroysku leikarunum, sum hava havt altjóða støði

## Súni Fríði um útlendskar leikarar

- Talið á útlendskum leikarum er hækkað nógv, meðan eg havi spælt. Teir hækka støðið til deils, men tað eru alt ov nógvir vánaligir ella miðalgóðir leikarar, sum koma til landið. Eg haldi, at ein útlendskur leikari skal skara framúr. Nógv av feløgunum hava ov lætt við at bjóða einum útlendskum leikara nógvar pengar. Tey áttu í staðin at bjóða einum ungum, góðum føroyskum leikara pengarnar.

# Málrevurin droymi

**34 ára gamli Súni Fríði Barbá hevur í fleiri ár verið millum bestu áleyparar í Føroyum. Flúgvióttin hevur tó forðað honum í at spælt við landsliðnum. Hansara dreymur er at gerast venjari í framtíðini – og helst hjá B68**



*– Tað skal ikki vera nøkur loyna, at eg biði áðrenn hvønn dyt, sigur Súni Fríði Barbá, sum eisini altíð fær sær tveir sjokolátapuntar beint undan dysti*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Fótbóltur



**Heini S. Kristiansen**
heinik@sosialurin.fo

Súni Fríði Barbá er ein av mest royndu fótbóltsspælarum, sum enn eru virknir. Hann tekur eitt tørn aftur í ár, nú hann skal vera leikandi hjálparvenjari hjá AB, sum roynir seg í bestu deildini fyri fyrstu ferð.

Súni Fríði býr í Kvívík saman við unnustuni. Tey hava trý børn, og tey fluttu inn í nýggj hús í 2004. Súni Fríða arbeiðir á dagsstovninum í Kvívík. Hann viðurkennir, at fótbólturin fer við nógvari tíð:

- Tú ert sera upptikin sum fótbóltsspælari. Tú mást ráðføra teg við familjuna. Hetta hevði ikki borið til uttan eina góða unnustu, sigur hann.

### Toftamaður í Runavík

Súni Fríði er uppvaksin í Runavík, men hann er heilur toftamaður.

- Bæði foreldrini eru av Toftum, men tey fluttu inn til Runavíkar. Eg havi búð øll míni barndómsár í Runavík, og barndómsfelagið er NSÍ, sigur hann.

Súni Fríði hevur tó spælt fleiri ár við B68 – seinast í fjør, har ið hann hevði eitt gott kappingarár, hóast felagið flutti niður.

- Tað er torført at siga, hvat felag liggur hjartanum næst, men eg haldi, at svarið má verða B68. Eg havi havt nógv góð ár á Toftum, og eg havi altíð kent meg væl har. Familjubondini á Toftum eru eisini sterk, sigur hann.

Annars hevur Súni Fríði eisini leikt við HB, GÍ og AB. Hann hevur sum heild einans havt góðar upplivingar í feløgunum.

- Tað hava ongantíð verið rættiligar ósemjur. Okkurt einkult dømi hevur verið, men eg klári at hyggja øll í eyguni í dag, sigur hann.

### Flogræðsla forðaði altjóða gjøgnumbroti

Súni Fríði hevur tvær ferðir verið toppskorari í bestu deildini og einaferð í næstbestu deildini. Hann hevur altíð verið góður fyri nøkrum málum. Kortini hevur hann einans leikt tveir landsdystir. Orsøkin til hetta er flogræðsla.

- Eg var við í hópinum fleiri ferðir. Eg kom inn móti Norra í 1993, men síðani mátti eg melda avboð til landsliðið fleiri ferðir. Orsøkin til hetta var flogræðsla. Eg vann tó seinni yvir óttanum.

- Síðstu ferð eg bleiv úttikin, meldaði eg eisini avboð. Tað var tá ið Føroyar spældi móti San Marino. Tá fekk eg at vita, at teir høvdu ætlað, at eg og Todi skuldu byrja inni. Hendan dystin bleiv John Petersen úttikin fyri meg, og vit kenna øll, hvussu væl hansara fótbóltsleið gekk aftaná hetta.

- Síðani hevur kappingin um álopsplássini verið hørð, og eg havi ongantíð fingið boð aftur. Sæð í bakspeglið, angri eg eitt sindur, at eg ikki fór við. Eg kenni tað soleiðis, at landsliðið manglar í mínari yrkisleið sum fótbóltsleikari. Men tá kláraði eg ikki at fara við, tí at vit skuldu flúgva, sigur Súni Fríði.

### Ísland sent boð fleiri ferðir

Útlandið hevur eisini sent boð eftir Súna Fríða, men tilboðini hava ikki verið nóg spennandi.

- Eg hevði fleiri ferðir møguleikan at fara til Íslands at leika, men íslendskur fótbóltur segði mær einki. Mær hevur altíð dámt væl enskan fótbólt, so um eitt tilboð hevði komið frá einum enskum felagið í triðbestu deildini, hevði eg tikið av. Men tað kom ongantíð, og tí havi eg einans leikað her heima, sigur Súni Fríði.